## Grønlendingar selt gullið

Grønlendska námsfelagið Nunaminerals hevur selt sín part av tí einasta gullnáminum í Grønlandi, og sølan ber í sær, at nú eiga útlendingar alt námið, skrivar KNR. Nunaminerals átti 17,5 prosent av náminum, og tann partin hevur bretska felagið Crew Gold Corp. keypt. Sølan merkir tó ikki, at Nunaminerals ætlar at sleppa gullinum. Tvørturímóti ætlar felagið at brúka sølupeningin til at leita eftir gulli saman við øðrum í Eysturgrønlandi.



## Í dag er J-Dagur

J-Dagur 2. november er stóri dagurin, tá jólabryggið hjá Føroya Bjór er at fáa. Jólabryggið er myrkt bjór, bryggjað av spennandi maltsløgum og kryddað við úrvaldari humlu. Jólabryggið hevur eina spennandi flavoursamanseting, ið hóskar sera væl afturvið øllum føroyskum jólamati: røstum kjøti, steik, dunnu ella gás. Ja eisini til ræstan speril. Ølfelagið Selskab for Vestjydsk ølkultur hevur í nógv ár valt jólabryggið hjá Føroya Bjór, sum tað besta í Kongaríkunum. Á Føroya Bjór eru tey ógvuliga væl nøgd við Jólabryggið 2007.

# Deydligur morgun á Kósini



*Kósabrúgvin hósmorgunin, einki skip og eingin útróðrarbátur. – Tað sær ikki best út í løtuni, men onkrir glottar eru kortini, sigur landingarformaðurin, Pól Fuglø*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Fiskiskapurin hevur sum heild verið slakur higartil í heyst. Lítil toskur er at fáa, og minni hevur verið at fingið av upsa. Útróðurin hevur eisini verið slakur, og lítil útróðrarfiskur er komin upp á landi. Men í løtuni eru onkrir glottar at hóma**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einki skip, ei heldur nakar útróðrarbátur, lá við Kósabrúnna, tá vit vóru fram við ein túr hósmorgunin.

Øll tann langa bryggjan lá so púrasta ber. Einasta lívstekin, vit sóu, var ein maður, sum stóð við einari sigarett i hondini við norðara enda á Kósavirkinum.

At einki skip og eingin bátur liggur við bryggju, nýtist kortini ikki at merkja, at fiskaloysið rættiliga er farið at gera um seg og leggur fiskavirkini lamin.

Eru skipini ikki við bryggju, eru tey onkra aðrastaðni, og í løtuni eru flestu skipini, sum eru heimahoyrandi í Klaksvík, úti.

Fiskiskapurin hevur sum heild verið slakur higartil í heyst. Lítil toskur er at fáa, og minni hevur verið at fingið av upsa. Útróðurin hevur eisini verið slakur, og lítil útróðrarfiskur er komin upp á land.

### Fáar landingar

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at hesa vikuna hevur sum heild lítið virksemið verið fram við Kósabrúnni.

- Tað er sjáldan, at so lítið landingarvirksemi hevur verið sum hesar seinastu dagarnar.

Hann hevur tó skilt, at partrolararnir hava rakt við fitt av upsa aftur, og í dag koma Fjalshamar og Nónhamar inn at landa.

- Eg haldi, at skipini hava fingið uppí. Tey hava eini 300 kør tilsamans, sum taka millum 280 og 300 kilo hvørt karið. Skipini fóru út seinasta leygardag, so hetta er ein góður túrur hjá teimum.

Hann sigur, at landingarfólkið skuldi møta til arbeiðis á bryggjuni klokkan 06 í morgun.

Týsdagin landaðu partrolararnir Borgarin og Navarin í Klaksvík. Teir høvdu 265 kør tilsamans.

### Útróðurin bragdar

Mikudagin landaði snellubáturin Karlamagnus. Hetta er gamli Søkin. Teir royna við snellu, og hendan túrin høvdu teir eini 12.000 pund av upsa. - Karlamagnus hevur verið nakrar túrar, og eg haldi, at tað hevur gingið hampiligt, sigur Pól Fuglø.

Hann vísir á, at higartil í heyst hevur lítil útróður verið við línu, men líkt er til, at tað er farið at bragda nakað aftur hjá útróðrarbátunum.

- Í gjár tóku vit ímóti fiski hjá fýra útróðrarbátum. Brandur og Reynsmúli høvdu umleið 4.000 pund í part, Bragd hevði 5.500 og minnist eg rætt, hevði Líðhamar 8.500 pund. Pól sigur, at teir størru bátarnir, sum Bragd og Líðhamar, vanliga seta einar 50-60 línur hvør.

### Seld línuskip

Landingarformaðurin vísir á, at tvey av línuskipunum, sum leingi hava verið heimahoyrandi í Klaksvík, Núpur og Pison, eru seld. Núpur fór til Vestmannar og Pison í Vágarnar.

Hann heldur kortini ikki, at tað er hetta, sum ger, at landingarfólk og fiskafólk annars merkja, at minni fiskur kemur upp á land.

- Vit hava seinastu árini eisini fingið onnur skip til bygdar, so samanumtikið er tað minkandi veiða, sum er orsøkin til, at minni virksemi er við bryggjukantin og soleiðis eisini á fiskavirkjunum.

Pól Fuglø sigur, at í seinastuni hevur longri verið ímillum tey longu landingartørnini.

- Tað verður altíð upp og niður, og hóast samlaðu landingartølini hava verið minkandi, nú tað eisini hevur víst seg at vera minni at fáa av upsa, er júst í løtuni aftur glottar at hóma.

Landingarformaðurin vísir á, at Fjalshamar og Nónhamar júst hava gjørt ein góðan túr, og líkt er sum nevnt eisini til, at útróðurin er við at gerast betri.

Í síðstu viku hevði Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík einar 13 størri og smærri landingar.

# Vandamikla vegastrekkið í Leirvík



*Á hesum vegastrekki eru í minsta lagi sjey ferðsluóhapp hend, síðan Norðoyatunnilin læt upp*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjakvøldið hendi tað aftur. Ein bilur, sum var á veg niðan úr Norðoyartunlinum og niðan á vegin, sum gongur millum Leirvík og Vík, koyrdi beint tvørtur um vegin og fór runt hinumegin vegin. Fleiri fólk vóru í hesum bili, men lukkutíð hendi eingin mansskaði.

Ikki hesaferð heldur…

Løgreglan í Eysturoy sigur, at hetta er sjeynda ferðsluóhappið, sum tey vita um er hent á sama hátt og á hesum sama vegastrekki.

Tíbetur er ikki stórvegis mansskaði hendur, men spurningurin er, nær vit fáa fyrstu vanlukkuna á hesum staði – um einki verður gjørt fyri at bøta um ferðslutryggleikan á vegastrekkinum.

Vandin er, tá tú kemur niðan úr Norðoyatunlinum Leirvíkarmegin og skalt koyra út á vegin, sum gongur úr Leirvík og út á Vík.

Onkusvegna hendir tað, at fleiri – og kanska serliga tey minni kendu á hesi leið – hava lyndi til at koyra beint fram, tá tey koma niðan móti.

Í slíkum føri er stórur vandi á ferð, tí nógv og tung ferðsla koyrir dagliga millum Leirvík og Vík.

Spurningurin, ið løgregla og onnur seta sær, er tí, nær vit fáa fyrstu vanlukkuna, har bilur, sum kemur eftir tunnilsvegnum, koyrir beint út á vegin, samstundis sum ein lastbilur ella annar bilur koyrir framvið á hinum vegnum.

Myndin, sum vit tóku í morgun, lýsir væl, hvussu hetta vegastrekkið sær út.

Løgreglan sigur seg ikki nágreiniliga duga at siga, hvat tað er, sum ger, at tað er so trupult at koma niðan av tunnilsvegnum og niðan á vegin, sum gongur millum Leirvík og Vík.

- Eitt er, at hetta er eitt myrkt og helst ov illa uppmerkt vegastrekkið. Í aðrar mátar virkar tað fyri fleiri bilførarar, sum um vegurin bara gongur beint fram, tá tú kemur niðan ímóti, sigur løgreglan, sum mælir fólki til at vera serliga ansin á hesum vegastrekki í Leirvík.